# Sólorka og heittvatnstangar

## Heittvatnstangar

Við MFT og MFT-D multifunktiónstangunum hjá CTS nøkta vit tørvin hjá flestu húsarhaldum í Føroyum at goyma heita vatnið.

PCWT-300LE hóskar væl at nýta saman við "Íspinninum". Tangin er dupultur og kombinerar sentralhitan við brúksvatnið.

Niðari tangin er goymslutangin til sentralhitan. Hann tryggjar, at hitaskipanin arbeiðir javnari, og at hitapumpan tí ikki startar so ofta.

Ovari tangin er til brúksvatnið. Vatnið verður forhitað gjøgnum niðara tangan, áðrenn hitalikamið hitar vatnið víðari eftir tørvi.

PDWT-300LE2 virkar á sama hátt, men gevur eisini møguleika at samantvinna fleiri orkukeldur, t.d. Íspinn og sólhita. Í ovara tanganum  er ein eyka spiralur, sum kann bindast í sólfatur, sum so hita brúksvatnið í staðin fyri hitalikamið.



## Sólfatur

Hóast vit í Føroyum ikka hava líka nógvar sóltímar sum í londunum fyri sunnan, so ber eisini væl til at gagnnýta sólina her hjá okkum.

Biligasti máti at hita bæði hús og brúksvatn er at deila hitaskipanina sundur – ein Íspinn ella luft-vatn hitapumpu til sentralhitan og sólfatur til brúksvatnið.

CTS stendur fyri Clean Tech Solutions. Veitarin leggur serliga dent á at framleiða vørur til orkusparandi skipanir. CTS framleiðir m.a. Hitapumpur, heittvatnstangar og sólpanelir.



**RenoVent Sp/f** Bryggjan 1 FO-420 Hósvík Faroe Islands Tel. 66 11 00 renovent@renovent.fo www.renovent.fo

## Heittvatnstangar

Heittvatnstangin er til at savna heitt vatn í, og hann er snúningsdepilin í hitaskipanini í húsinum. Øðrumegin er sjálv hitaskeldan, t.d. ein Íspinnur ella ein luft-vatn hitapumpa, og hinumegin er hitasundurgreiningin, antin við radiatorum ella við gólvvarma.

Tangarnir frá CTS eru væl bjálvaðir og kunnu eisini bindast saman við sólvarma. Teir hóska tí sera væl til lágorkuskipanir.




## Sólfatur / sólhitapanel

Sólfatur er samansett av einum lag av glasi, einari ramma úr aluminium, bjálving og einari absorberplátu ella ídrekkara, sum er úr kopari.

Absorberplátan er viðgjørd, so hon sýgur hitan úr sólstrálum í seg. Hitin verður fluttur yvir í ein løg, sum er vatn blandað við frostløg. Løgurin verður leiddur víðari til húsið við pumpu.

Av tí at flatafaturið er so einfalt, verður tað hildið at hava longri haldgóðsku enn onnur fatur. 30 ár er ikki óvanlig livitíð fyri góð flatasólfatur






*Dømi við hitapumpu og heittvatnstanga*